# *Oddagrein*

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# IKKI EYKASKATT FYRI TUNLAR

So kom aftur eldur í málið um Skálafjarðartunnilin. Hesaferð var orsøkin, at BankNordik er komin við fíggingarmodelli, har tað skal vera eitt alment partafelag, sum eigur og byggir Skálafjarðartunnilin – og sum eisini skal eiga hinar undirsjóvartunlarnar. Hugskotið er, at inntøkan frá øllum tunlunum skal tryggja inntøkugrundarlagið soleiðis, at trygd er fyri, at lánið verður afturrindað.

Fyri so vítt er hetta sama modell, sum vit hava hoyrt áður. Jóannes Eidesgaard var eisini skjótur úti við sínari hugsan – at hesin leisturin »fekk málið um Skálafjarðartunnilin aftur á beint«.

Tað er kanska ikki so løgið, at partar av politiska myndugleikanum ikki eru so heitir fyri, at ein slík samferðsluútbygging verður gjørd á privatum grundarlag. Eisini tað, at nevndarlimir í felagnum høvdu útvegað sær persónlig partabrøv fyri fleiri hundrað túsund krónur skapar politiska mótstøðu. Og illa var, um slíkt ikki elvdi einum slíkum felag mótstøðu.

Hinvegin so er tað eisini ein herskin biti hjá vágafólki og norðoyinum at svølgja, at teirra tunlar ikki verða ókeypis at koyra ígjøgnum, tá teir eru útgoldnir, soleiðis sum ætlað hevur verið. Tí er hetta sjálvandi ein trupulleiki, sum ikki er so heilt einfaldur at loysa. Men eyðsæð er, at møguleikin fyri at tað almenna má taka um endan, um verkætlanin skal gerast veruleiki, er til staðar.

Jóannes Eidesgaard nevndi, at vit eisini kunnu fara at taka tunnilsgjald fyri Kollafjarðartunnilin og brúgvagjald fyri brúnna um Streymin – og at vit eisini kunnu leggja eitt eykagjald á vegskattin, til tess at fíggja samferðsluútbyggingar. Álvaratos, Jóannes Eidesgaard, nú mást tú líka stýra tær. Eitt er tað, at fólk mugu liva við einum tunnilsgjaldi fyri undirsjóvartunlarnar. Hetta var prísurin fyri at sleppa at koyra heldur enn sigla, og gjaldið er eisini munandi lægri, enn tað var fyri at sigla. Men at taka gjald fyri at koyra um eina brúgv, sum er 40 ára gomul og ein tunnil, sum er



20 ára gamal, tað er jú beinleiðis at halda fólk fyri gjøldur. Og at fara at leggja ein eykaskatt á bileigarar, tað er í øllum førum púra hol í høvdið. Tí tá frátekur tú okkum valmøguleikan. Tá hava vit ikki eitt brúkaragjald, sum vit kunnu velja at sleppa undan, tá hava vit ein eykaskatt. So var betur, at vegskatturin varð avtikin, og at eitt gjald var lagt oman á brennievnið. So var tað tann, sum brúkti vegakerviðiðh, sum rindaði, og tað er væl saktans ikki annað, enn rímuligt.

At tað almenna tekur um endan, tað er í ordan. Men tað skal ikki seta hinar landspartarnar verri fyri.

**»» Vit mugu hava frælsi at velja tunnilsgjald frá**

## Ósolidarisk fakfeløg?

Stríðið millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgni er eitt margháttligt stríð. Traditionella stríðið hjá fakfeløgunum er at vinna og síðani at virða vunnin rættindi. Eitt av hesum rættindum er samráðingarrætturin, sum báðir partar í nógv ár hava virt, líka mikið, hvussu nógv stendur á.

Men í stríðnum sum nú valdar millum manningarfeløgini og Reiðararfeløgini tykist alt at verða farið upp í uppoysn. Manningarfeløgini gjørdu í gjár ein sáttmála við eitt reiðarí. Hinir reiðararnir eru sum vera man í øðini, og Føroya Reiðarafelag hevur kastað frá sær og latið samráðingarnar upp fyri skutil.

Tað er væl skilligt, at Reiðarafelagið ger soleiðis. At okkurt reiðarí ger undirhondsavtalur, tað er so tað, tað er. Men at manningarfeløgini gera sáttmálar við einstøk reiðarí í eini verkfalsella verksbannstøðu, tað er ikki til at skilja. Tað kann bara føra til totala frustratión, sum í síðsta enda gongur harðast út yvir hýrurnar hjá fiskimonnum.

Ein sera løgin og óbúgvin fakfelagspolitikkur, sum manningarfeløgini føra...



*Viberg Søresen, formaður í Føroya Reiðarafelag, kann nú róliga lena seg afturá, nú sundurlyndi valdar millum manningarfeløgini. Við at gera sáttmála við einstøk reiðarí hava manningarfeløgini frásagt sær samráðingarrættin við Reiðarafelagið, sum sjálvandi ger sær dælt av støðuni*



**»» Skilagóður samferðslureformur**

JÓNLEIF JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 33



**»» Mugu finna aðrar orkukeldur**

HELG ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 33

## Øsa seg um boppurnar hjá Medinu



Tað hevur skapt mikla øsing í Danmark, at Medina var í eini so gjøgnumskygdari blusu, tá hon framførdi til Danmarksinnsamlingina leygarkvøldið, at øll sóu bróst hennara. Sjálvandi hevur Medina gjørt hetta fyri at provokera og fyri á tann hátt at fáa fokus á seg sjálva.

Sjónvarpið hjá Kringvarpinum vísti eisini sendingina, men føroyingar eru nú um dagarnar so vanir við at síggja boppur í sjónvarpinum, at tað rínir ikki við, at vit skulu síggja boppur gjøgnum eina rímuliga gjøgnumskygda blusu.

Men tað sum undrar meira er, hví í Guds garði Kringvarpið setir eina slíka perudanska sending á skrá í bestu senditíð, sum føroyingar als ikki kunnu taka lut í.

Men her kemur bati, tí sambært public service sáttmálanum, so skal Kringvarpið framleiða undirhald eisini, so kanska V4 fær eina renesansu í sjónvarpshøpi...

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*